# LEIKSKRÁ

9. UMFAR

21. JUNI 2020

BLAÐ NR. 05




MYND: JENS KRISTIAN VANG

FÓTBÓLTSFELAGIÐ B36 F.C. TÓRSHAVN

HAVSBRÚN

VÆLKOMIN TIL
DYST Í FLØTUGERÐI

betri DEILDIN

# Innihald


Dysturin í dag ..... 4
Hagtøl fyri Betri-deildina hjá monnum ..... 8
Liðuppsetingin hjá ÍF og B36 ..... 10
Leikarin hesaferð ..... 14
Hagtøl fyri Betri-deildina hjá kvinnum ..... 18
Seinasti dysturin ..... 22
ÍF-sangurin ..... 24



**ÍF**, Ítróttarfelag Fuglafjarðar, 530 Fuglafjørður, tel. 228771, if@if.fo, www.if.fo.
**Útgevari:** ÍF-fótbóltur. **Ábyrgd:** ÍF-fótbóltur. **Uppsetan:** Maibritt P. Bærentsen.



MAGN KAFFI
NÝMALIÐ • VISTFRØÐILIGT





HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Boks 81 • 530 Fuglafjørður • tel. 41 44 00 • fax 41 44 01
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fi



**TEKST:** EIVIN BREIÐASKARÐ

# Dysturin í dag

Eftir góða úrslitið í Sarpugerði farna mikukvøld, standa vit í dag yvirfyri árstalsfelagnum B36 á heimavølli. Vónirnar eru góðar til at fáa eitt gott úrslit burturúr einum dysti, har B36 hóast alt er favorittur, tí teir hava verið partur av topp-4 í føroysku kappingini nógv tey síðstu nógvu árini.

B36 hevur higartil havt eina hampuliga góða byrjan uppá kappingarárið 2020. Liðið byrjaði við 4 sigrum á rað, men í teimum 4 síðstu dystunum eru bert komin 4 stig á stigatalvuna. Hetta ger, at liðið hjá Jákup á Borg hevur 16 stig og nokk skal fáa nógvar sigrar í hús komandi tíðina, um teir ætla sær at fylgja við hinum toppliðunum, har serliga HB og KÍ renna undan og vinna mestsum hvønn dyst.

ÍF-liðið kemur inn til hendan dystin við nógvum sjálvsáliti eftir 3 sigrar og 1 javnleik í 4 teimum síðstu dystunum. Serliga sigurin ímóti Víkingur nú mikukvøldi gevur eitt "boost" rætta vegin. Kennslan eftir tann dystin er, at hetta kann gott blíva eitt spennandi kappingarár fyri besta mannsliðið hjá okkum. Hvør veit, um ÍF ikki kann fara spæla teimum sonevndu fótbóltsserfrøðingunum eitt puss og enda á einari placering á stigatalvuni, sum ongin av teimum hevur spátt um. Spennandi hevði tað verið.

Vinnur ÍF í dag, so kemur liðið upp á liðina á B36 á 4.plássinum. Tað er ein heilt onnur støða, enn tann støðan, sum liðið lá í alt síðsta kappingarár. Nú hóma vit veruliga tey plássini, sum eru stuttlig at spæla um. Tað kann óiva setast spurnartekin við styrkina á ÍF-liðnum, men higartil hava dreingirnir víst góðar taktir í fleiri av dystunum. Tó kann tað verða eitt sindur svikaligt við breiddini á liðnum, tá ið fleiri stuðulsspælarar ikki eru tøkir.

Tað er óvíst um fleiri av spælaraunum í dag vegna skaðar: Málverjin Milos er úti vegna skaða, og tað eru Bogi Løkin og Dánjal á Lakjuni eisini. Karl Løkin situr dystin í dag yvir vegna leikbann. Maður kemur tó í mans stað, og aðrir leikarar mugu tí vísa, hvør dugur er í teimum.

Standi saman um okkara dreingir, og vísi teimum aftur í dag, at vit bakka teir upp. Áðrenn dystin ímóti Víkingur hevði eg mót uppá eitt gott úrslit. Tað havi eg so sannilig aftur í dag. Koyr á ÍF.

*Góðan dyst*






INTERSPORT
Thomas Dam ítróttur




Thomas Dam Intersport
Bøgøta 1, Klaksvík
455320

Thomas Dam Intersport
Jónas Broncksgøta 21, Tórshavn
355300

Thomas Dam Intersport
Glyvravegur 38, Glyvrar
447399




SPEKT
løggildir
grannskoðarar
Tórshavn
Staravegur 17
Tel. 34 34 34
Klaksvík
Stangaskákið 1
Tel. 34 34 35
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo
Heildarloysn fyri kappingarføran prís
Lætt og ómakaleyst
XBRL, skatt, bókhald, MVG, roknskap og annað
Nú eisini skrivstovu í Klaksvík
Sjálvuppgáva
TAKS
Ring ella les meira um okkara heildarloysnir á www.spekt.fo


Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo
TÍTT FLUTNINGSFELAG
samskip


Heildaveitari
til sjóvinnuna
Vit umboða hesi merki
Cummins
Bátamotorar
3M PELTOR
Oyravernd
EXIDE BATTERIES
Akkumulatorar
Fronius
Sveisiútgerð, elektrodir, gass
Mobil
Smyrjiolja
Dräger
Filtur, maskur og gassmátarar
CREWSAVER
Solas góðkendir bjargingarvestar og draktir
DSB RFD
Bjargingarbátar
MULLION
Flóti og yvir-livilsisdraktir
· Oljuklútar
· CO2 og onnur køligass
· Sløkkiútgerð og tænasta
Noreqfender
NOREQFENDER
Fønix
Mykinesgøta 8 · Boks 18 · FO-110 Tórshavn · Tel 31 19 09

KELDA: FAROESOCCER

## 8. UMFAR

### Betri-deildin Menn

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 8 | 7 | 1 | 0 | 23 | 6 | 17 | 22 |
| 2 | NSÍ | 8 | 5 | 2 | 1 | 20 | 4 | 16 | 17 |
| 3 | KÍ | 8 | 5 | 2 | 1 | 23 | 9 | 14 | 17 |
| 4 | B36 | 8 | 5 | 1 | 2 | 23 | 13 | 10 | 16 |
| 5 | ÍF | 8 | 4 | 1 | 3 | 12 | 17 | -5 | 13 |
| 6 | Víkingur | 8 | 3 | 2 | 3 | 12 | 13 | -1 | 11 |
| 7 | EB/Streymur | 8 | 2 | 1 | 5 | 6 | 14 | -8 | 7 |
| 8 | TB | 8 | 1 | 2 | 5 | 5 | 11 | -6 | 5 |
| 9 | AB | 8 | 0 | 3 | 5 | 4 | 23 | -19 | 3 |
| 10 | Skála | 8 | 0 | 1 | 7 | 6 | 2 | 4 | 1 |

Niðurflytingar strikan til 1. deild

**HETTA UMFARIÐ**

- ÍF - B36
- TB - AB
- EB/Streymur - Víkingur
- KÍ - Skála
- NSÍ - HB

**10. UMFAR**

- ÍF - TB
- EB/Streymur - B36
- Víkingur - KÍ
- Skála - HB
- AB - NSÍ

## TOPP 10

### MÁLSKJÚTTAR í Betri-deildini

| NR | NAVN | | MÁL |
|---|---|---|---|
| 1 | Jóannes **Bjartalíð** | (KÍ) | 7 |
| 2 | Adrian **Justinussen** | (HB) | 6 |
| 3 | Klæmint A. **Olsen** | (NSÍ) | 6 |
| 4 | Petur **Knudsen** | (NSÍ) | 6 |
| 5 | Uros **Stojavnoc** | (ÍF) | 6 |
| 6 | Meinhard E. **Olsen** | (B36) | 5 |
| 7 | Michal **Przybylski** | (Skála) | 5 |
| 8 | René S. **Joensen** | (HB) | 5 |
| 9 | Sebastian **Pingel** | (B36) | 4 |
| 10 | Árni **Frederiksberg** | (B36) | 3 |

## TOPP 10

### UPPLEGG í Betri-deildini

| NR | NAVN | | MÁL |
|---|---|---|---|
| 1 | Jann **Benjaminsen** | (NSÍ) | 7 |
| 2 | Philip **Djordjevic** | (ÍF) | 5 |
| 3 | Jóannes **Bjartalíð** | (KÍ) | 5 |
| 4 | Árni **Frederiksberg** | (B36) | 4 |
| 5 | Petur **Knudsen** | (NSÍ) | 4 |
| 6 | Sebastian **Pingel** | (B36) | 4 |
| 7 | Stefan **Radosavljevic** | (B36) | 4 |
| 8 | Daniel **Johansen** | (HB) | 3 |
| 9 | Heðin **Hansen** | (HB) | 3 |
| 10 | Michal **Przybylski** | (B36) | 3 |





# 6. UMFAR

## ÍF – betri deildin – AB

**ÍF**

| Leikari | Nr. |
|---|---|
| Tóri T. **Traðará** (M) | 1 |
| Jan Ó. **Ellingsgaard** (L) | 3 |
| Jens **Joensen** | 4 |
| Karl **Løkin** | 6 |
| Dánjal **á Lakjuni** | 7 |
| Uros **Stojanov** | 8 |
| Filip **Djordjevic** | 9 |
| Ari Ó. **Ellingsgaard** | 10 |
| Hákun **Edmundsson** | 11 |
| Hans Jákup **Lervig** | 12 |
| Jákup **N. Olsen** (M) | 13 |
| Gundur E. **Petersen** | 14 |
| Bogi A. **Løkin** | 15 |
| Sámal **Joensen** | 17 |
| Pól Jákup **Lundsbjerg** | 18 |
| Rói **Róin** | 19 |
| Jóhan **Petersen** | 20 |
| Tóri **N. Olsen** | 21 |
| Sjúrður Pauli **Nielsen** | 22 |
| Andy Ó. **Olsen** | 23 |
| Milos **Budakovic** (M) | 25 |
| Ólavur **Larsen** | VENJARI |
| Hans Jørgen **Djurhuus** | VENJARI |
| Pauli **Jarnskor** | MÁLMANSVENJ. |
| Milan **Svojic** | HJÁLPARVENJ. |

**LIÐLEIÐARAR:** TRÚGVI NESÁ, ÓLAVUR ELLINGSGAARD, POUL N. MIKKELSEN OG PALLI VANG
**FYSIO:** HANUS ELIASEN, ÁLVUR HANSEN OG JÓNFRÍÐ HANSEN

**AB**

| Nr. | Leikari |
|---|---|
| 1 | Rói M. **Hentze** (M) |
| 2 | Andrias H. **Eriksen** (L) |
| 3 | Magnus H. **Jacobsen** |
| 5 | Sonni Ragnar **Nattestad** |
| 6 | Eli F. **Nielsen** |
| 7 | Árni **Frederiksberg** |
| 8 | Stefan **Radosavljevic** |
| 9 | Meinhard E. **Olsen** |
| 10 | Erlendur **Magnusson** |
| 11 | Benjamin **Heinesen** |
| 12 | Alex **Mellemgaard** |
| 13 | Erling **Dávidsson** |
| 14 | Jóhann H. **Joensen** |
| 15 | Hugin **Samuelsen** |
| 16 | Simun Rógvi **Hansen** (M) |
| 17 | Mattias W. **Joensen** |
| 18 | Andreas **Thomsen** |
| 20 | Andras **Johansen** |
| 21 | Brian **Jakobsen** |
| 22 | Sebastian **Pingel** |
| 24 | Ragnar **Samuelsen** |
| 25 | Mattias **Lamhauge** (M) |
| 28 | Michal **Przybylski** |
| 30 | Martin **Agnarsson** |
| VENJARI | Jákup **á Borg** |
| HJÁLPARVENJ. | Fróði **Clementsen** |
| HJÁLPARVENJ. | André **Olsen** |
| MÁLMANSVENJ. | Tróndur **Vatnhamar** |

**FYSIO:** BEINTA B. LAURSEN
**LIÐLEIÐARAR:** KÁRI JOHANSEN, JENS KRISTIAN HANSEN OG JOHNNY SAMUELSEN

| | |
|---|---|
| DÓMARI | Eiler **Rasmussen** |
| HJÁLPARDÓMARAR | 1. Petur Páll W. **Hentze** 2. Pætur E. **Resmussen** |
| 4. DÓMARI | Jón Tór **Baldvinsson** |
| EYGLEIÐARI | Jens **Midjord** |

**BÓLTSTUÐUL:** PETUR ABRAHAMSEN



MOWI

FAROE ISLANDS

RINKA

FINEST SALMON

CRAFTED BY NATURE



**FULLKOMILEIKIN HEVUR EITT NAVN.** Hon eitur Rinka. Hon er sterk. Sjáldsama vøkur. Rinka veksur seg til í Føroyum og verður myndað av brimi og kyrru. Tað er hetta, sum ger hana til heimsins besta laks. Handfarin við nærlagni. Handfarin av náttúruni.

Hetta er Rinka. Laksur úr Føroyum frá Mowi.

RINKA.FO


Sjóbusiness
Góð sambond síðan 1919
FAROE SHIP


Green Marine Divers
Tlf.: +298 77 00 60


teknistovan GØTA
Jens Kl. Jacobsen
Far.: jkj 232343
Henning Olsen
Far.: ho 232344
FO 510 Gøta tel. 442344 teknistovan@teknistovan.fo www.teknistovan.fo


Heildar-
loysnir
frá
ArtiCon
BANKNORDIK
ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

LEIKARIN

# 10 ARI Ó. ELLINGSGAARD

**TEKST OG MYND:** ATLI PETERSEN

## TÚ

**Navn:** Ari Ólavsson Ellingsgaard
**Føðingardagur:** 03.02.1993
**Føðistað:** Tórshavn
**Starv:** lesi til námsfrøðing
**Pláss á vøllinum:** Vinstri vongur
**Yvirtrúgv:** Kukka áðrenn dyst
**3 orð sum lýsa teg:** Snedigur, stuttligur og fittur
**Torførasti mótstøðumaður:** Jens Joensen
**Frítíðarítriv:** Dart
**Vónir fyri 2020:** Vinna steypakappingina

## TÍN ÍTRÓTT:

**Fyrsti dystur á 1.liðið:** 2009 ímóti B36
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** Uha, tá eg var eini 6 ár
**Aðrar ítróttargreinar:** Badminton, flogbóltur og so dart
**Minningarríkasti dystur:**Ein dystur, har eg skoraði 2 mál ímóti Víking
**Størstu fótbóltsliga ávirkan:** Beiggi
**Besti fótbóltsleikari:** Ronaldo
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** Dart
**Hvat slag av venjing dámar tær best:** Dyst
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** Renni venjing

## TÍNIR FAVORITTAR:

**Matur og drekka:** Sisu og pizza
**Slag av tónleiki:** Pop/rock
**Sjónvarpssending:** Family Guy
**At slappa av:** Liggja á sofuni og hyggja fótbólt

## TROYGGJA NR. 10

**Besti fótbóltsleikari nakrantíð:** Ronaldo
**Sjónvarp/filmstjørna:** Adam Sandler
**Besta bók/blað:** Bíblian
**Stuttligasti persónur:** Milan Svojic
**Stuttligasti í hópinum:** Milan Svojic
**Besti ÍF áskoðari:** Mamma og babba




## FAKTA UM ARI

Er bróðir liðskiparan hjá okkum, Jan.

Var til royndarvenjing hjá Hibernians í Skotlandi í 2010 og bleiv enntá biðin at koma aftur.

Hevur leikt vaksnmannafótbólt síðani 2009. Sambært Faroesoccer, so hevur hann leikt 286 dystir, fingið 44 mál, 74 gul og 5 reyð kort. Tað vil siga at lutfallið millum gul kort og mál er 1,6 gul kort/mál



OKKARA KJARNUØKI
GRANNSKOÐAN
ROKNSKAPARHJÁLP
SKATTUR
VIRKISRÁÐGEVING
BÓKHALD
MEIRVIRÐISGJALD
Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.
januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI
WWW.JANUAR.FO
SENDISTOVAN




Allar vanligar umvælingar
Dekksøla
Viðlíkahald
Bilverkstaðið á Kambsdali
Tlf. 441111




AGA
A Member of The Linde Group
-FØROYAR
ESAB
AGA - Føroyar/www.AGA.fo/Akranesgøta 2/FO-100 Tórshavn/Tlf + 298 - 315544/AGA@AGA.fo

KELDA: FAROESOCCER

## 5. UMFAR

### Betri-deildin Kvinnur

betri DEILDIN

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 5 | 5 | 0 | 0 | 10 | 2 | 8 | 15 |
| 2 | NSÍ | 5 | 1 | 3 | 1 | 7 | 4 | 3 | 6 |
| 3 | B36 | 5 | 1 | 3 | 1 | 6 | 5 | 1 | 6 |
| 4 | ÍVB | 5 | 1 | 2 | 2 | 5 | 8 | -3 | 5 |
| 5 | EBS/Skála | 5 | 1 | 1 | 3 | 3 | 10 | -7 | 4 |
| 6 | HB | 5 | 0 | 3 | 2 | 6 | 8 | -2 | 3 |

**HETTA UMFAR**
14. juni 2020

- HB - ÍVB
- KÍ - EBS/Skála
- NSÍ - B36

**KOMANDI UMFAR**
6. juli 2020

- ÍVB - EBS/Skála
- HB - B36
- KÍ - NSÍ

## TOPP 10

### MÁLSKJÚTTAR í Betri-deildini

| NR | NAVN | | MÁL |
|---|---|---|---|
| 1 | Heidi **Sevdal** | (NSÍ) | 3 |
| 2 | Bára **Magnussen** | (B36) | 2 |
| 3 | Evy á **Lakjuni** | (KÍ) | 2 |
| 4 | Eyðvør **Klakstein** | (KÍ) | 2 |
| 5 | Lea **Lisberg** | (EBS/Skála) | 2 |
| 6 | Malena **Olsen** | (KÍ) | 2 |
| 7 | Unn **Hvidbro** | (NSÍ) | 2 |
| 8 | Birna **Mikkelsen** | (EBS/Skála) | 1 |
| 9 | Elmi **Isaksen** | (HB) | 1 |
| 10 | Ester **Ellingsgaard** | (B36) | 1 |

## TOPP 10

### UPPLEGG í Betri-deildini

| NR | NAVN | | MÁL |
|---|---|---|---|
| 1 | Evy á **Lakjuni** | (KÍ) | 4 |
| 2 | Sanna **Svarvadal** | (KÍ) | 3 |
| 3 | Heidi **Sevdal** | (NSÍ) | 2 |
| 4 | Jensa **Tórolvsdóttir** | (ÍVB) | 2 |
| 5 | Julia Naomi **Mortensen** | (HB) | 2 |
| 6 | Anna . **Mikkelsen** | (EBS/Skála) | 1 |
| 7 | Elmi **Isaksen** | (HB) | 1 |
| 8 | Emma **Hansdóttir** | (B36) | 1 |
| 9 | Ester **Ellingsgaard** | (B36) | 1 |
| 10 | Hanna **Jacobsen** | (B36) | 1 |












**Vit takka fyri stuðulin**








7. UMFAR

**TEKST:** EIVIN BREIÐASKARÐ

# TB - ÍF

Tað varð 13.juni, at sera torførur útidystur ímóti TB varð á skránni við Stóra í Trongisvági. Tá ið ÍF-liðið fór suður til hendan dystin, varð nokk rokna við, at tað fór at verða trupult at vinna stig ímóti aldursforsetanum í føroyskum fótbólti.

Tó kann staðfestast, at aftaná síðsta bríksl í hesum dystinum høvdu okkara dreingir vunnið sær eitt stig afturat teimum 9 stigunum, sum liðið frammanundan hevði fingið áðrenn ferðini til Suðuroyar.

Talan varð um ein dyst, har TB nokk átti teir allarflestu stóru kjansirnar, men har sum ÍF eisini hevði okkurt gott tilboð. Tildømis hevði Dánjal á Lakjuni ein sera stóran kjans beinanvegin í dystinum. Tíverri fyri ÍF tók hann ikki av møguleikanum.

Alt í alt, so má sigast, at 1 stig í einum truplum útidysti er góðkent. Tá ið landskappingin endar í vetur, kann tað júst verða tílík stig, sum kunnu gera munin antin uppeftir ella niðureftir og harvið bjarga einum kappingarári fyri ÍF.



8. UMFAR

**TEKST:** EIVIN BREIÐASKARÐ - **MYND:** PALLI VANG

# Víkingur - ÍF

Lat tað verða sagt beinanvegin og klárt og týðiligt: Kennslan varð og er enn sera góð aftaná 2-1 sera flotta og týdningarmikla úti sigurin ímóti Víkingi mikukvøldið 17. juni

Lagt varð út við einum 1. hálvleiki, sum møguliga ikki er best leikti hálvleikurin í bestu føroysku mannsdeildini í ár, men tað varð tó sum vænta heimaliðið Víkingur, sum sat á tí mesta spælinum og stýrdi dystinum. Onki óvænta í tí. Onkur hendinga brúkligur kjansur báðar vegir bleiv tað til í fyrra hálvleiki, sum endaði 0-0.

Tá ið 10-15 minuttir vórðu farnir av seinna hálvleiki sat eg við einari kennslu av, at tað skjótt kundi enda galið fyri okkara dreingir, tí Víkingur sat mestsum á øllum í dystinum hesa løtuna.

Tó varð tað soleiðis, at tað varð útiliðið ÍF, sum skoraði fyrsta máli dystinum eftir 60 minttur. Altíð raski Filip stríddi seg innum verjuna hjá Víkingi í vinstru síðu. Uros sum stóð væl fyri rakti ikki bóltin, tá ið hann skuldi skjóta ímóti málinum. Ístaðinfyri fall bólturin til Gundur og hann setta bóltin í málið til 1-0 til ÍF.

Eftir 73 minuttir økti Uros til 2-0, tá ið hann trygt setta fótin á bóltin inniundir málinum hjá Víkingi. Aftur varð tað Filip, sum átti uppleggið og harvið aftur gjørdi stóran mun í útfallinum av hesum trupla dystinum.

Víkingur fekk pynta um úrslitið, tá ið uml. 80 min vóru farnir, men meir enn tað bleiv tað ikki til hjá ljósabláa liðnum úr Eysturkommunu.

Dysturin og flotta úrslitið bleiv annars skemdur av, at Milos í málinum hjá ÍF fekk ein álvasligan skaða eftir umleið 65 min. Hann verður nokk ikki á vøllinum fyri ÍF komandi mánaðirnar vegna slitið krossband ella okkurt líknandi.

Fagnaðurin varð sera stórur ímillum ÍF leguna aftaná Bjarki Danielsen hevði bríksla fyri síðstu ferð. Tað leiddi tankarnar á teir stuttligu útidystirnar ímóti Víkingur í 2011-2012.

Stuttligt varð at verða við og uppliva ein so søtan sigur, sum hendan týdningarmikla og flotta sigurin í Sarpugerði mikukvøldið 17.juni 2020.

# „Vit eru ÍF-fan“

## SYNGIÐ VIÐ

Í Fuglafirði mangan dystin leika
Í reyðum, hvítum klæðum eru tit
Á vølli allir leikarar nú reika
Og vinna dystin – ja, tað vilja vit.

**Vit eru ÍF-fan**
**Vit vita hvat ein kann**
**Vit eru best, og vinna hvat sum helst**
**Vit hava sett sum mál, at vinna hvørja sál**
**Nú Fuglafjørður hevur nátt sítt mál.**

Í deildini vit skulu verða bestir
Og vinna alt ið vinnast kann í dag
Jú, ÍF-leikarar teir eru treystir
Og fólkini tey gerast øll so glað.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Á vøllinum vit skulu standa saman
Um tað nú ikki gongur sum tað skal
Á bakkanum í álvara og gaman
Og vóna at tað gondur okkum væl.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Vit armarnar í lofti nú upp hevja
Og kunnu ikki standa her í frið
Tá sjálvandi vit gullið kunnu tevja
Nú eiga vit jú Føroya besta lið.

**Vit eru ÍF-fan ...**

TAKKAR FYRI STUÐULIN